

Fostur: 12 vikur gamalt

Hvat hava tey gjørt okkum?
Kaj Munk

Evnisdagur

Við Elisabeth og Carl Sukkot
Í Útvarpshøllini, leygardagin **13. nov. kl.10.00**

Boðið verður til tveir fyrilestrar um evnini:

1: **Hví fáa onkrar kvinnur sálarligar trupulleikar av fosturtøku, og aðrar ikki?**

2: **Hvussu verður familjan ávirkað av fosturtøku?**

*Fyrilestrarnir eru **almennir** og **ókeypis**!*

føroya PROVITA
provita@provita.fo · www.provita.fo

KREA.FO · TEL 44 93 39





WWW.SMYRIL-LINE.COM

VETRAR TILBOÐ

HETLAND

1 VIKA Í SUMMARHÚSI
FYRI 2 VAKSIN & 2 BØRN + BIL
2-RÚMS ÍBÚÐ Í EASTERHOULL CHALETS
Galdandi til 28/5-05 úr 5.570,-
**Íroknað er:** Ferðin fram og aftur í 4-koyggjukamari, innan, við wc/bað. Uppihald í 9 dagar í summarhúsi.

HETLAND-CRUISE
HÓSDAG TIL MÁNADAG
PRÍSUR VIÐ HOTELLGISTING
Galdandi til 28/5-05 úr 1.500,-
**Íroknað er:** Ferðin fram og aftur í 4-koyggjukamari, innan, við wc/bað. Uppihald í 2 nætur á hotelli.



DANMARK

1 VIKA Í DANLAND-ÍBÚÐ
FYRI 2 VAKSIN & 2 BØRN + BIL
Í HIRTSHALS, EBELTOFT & TRANUM KLIT
Galdandi til 28/5-05 úr 5.895,-
**Íroknað er:** Ferðin fram og aftur í 4-koyggjukamari, innan, við wc/bað. Uppihald í Danland-íbúð í 1 viku.

1 VIKA Í SUMMARHÚSI
FYRI 2 VAKSIN & 2 BØRN + BIL
SKALLERUP KLIT FERIECENTER
Galdandi til 28/5-05 úr 6.995,-
**Íroknað er:** Sigling Tórshavn-Hanstholm og aftur í 4-koyggjukamari, innan, við wc/bað. Uppihald í 1 viku á Skallerup Klit Feriecenter.

FERÐIST 2 GJALDIÐ FYRI 1
FRAM OG AFTUR VIÐ BILI

Til Danmarkar úr 3.270,-*
**Íroknað er:** Sigling Tórshavn-Hanstholm og aftur í 2-koyggjukamari, innan, við wc/bað við bili.

Til Hetlands úr 1.680,-*
**Íroknað er:** Sigling Tórshavn-Lerwick og aftur í 2-koyggjukamari, innan, við wc/bað við bili.

Til Íslands úr 2.640,-
**Íroknað er:** Sigling Tórshavn-Seyðisfjörður og aftur í 2-koyggjukamari, innan, við wc/bað við bili.

*Tilboðið er ikki galdandi hesar fráferðir: 6/1, 17/3 og 24/3



SMYRIL LINE

J. Broncks gøta 37 · Postsboks 370
FO-110 Tórshavn · Tlf: 34 59 00
Fax: 34 59 50 · booking@smyril-line.fo




# Ósemja um sjómark á Vestmanna

**Vestmenningar og kvívíkingar eru vorðnir ósamdir um mark. Ikki uppi á landi, men sjómark. Fyribils er arbeiðið upp á nýggja bátahylin hjá Kvívíkar Kommunu steðgað**

MARKNATRÆTA
*Edvard Joensen*



*Kvívíkar Kommuna er farin undir at gera bátahyl á Válinum. Vestmenningar halda, at teir koma um mark, og eru farnir at tosa um fútaforboð. Arbeiðið er steðgað fyribils*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Á Válinum:**
Kvívíkar Kommuna hevur steðgað arbeiðinum upp á nýggja bátahylin á Válinum, tí vestmenningar hótta við fútaforboði.

Men nú er talan um sinniligt fólkaslag, sum ikki plagar at loypa framav, so teir eru í øllum góðum farnir at tosa um málið og vænta at finna eina virðiliga loysn, siga báðir partar.

Vestmanna Kommuna havur gjørt vart við, at grótkastið í samband við bátahylin, sum Kvívíkar Kommuna er farin undir á Valinum, fer at koma so langt út frá landi, at tað fer um tað markið, sum vestmenningar siga, er galdandi eftir sjónum inni á Vestmanna. Kvívíkingar meta hetta ikki sum mark, og vestmenningar svara aftur við at hótta við fútaforboði, um kvívíkingar halda fram við arbeiðinum. Hetta halda kvívíkingar ikki vera tað vert, og hava tí av sínum eintingum steðgað arbeiðinum og heitt á Vestmenningar um at tosa saman um málið. Tað fara partarnir so at gera.

Kvívíkar Kommuna hevur av sínumeintingum steðgað arbeiðinum, tí tey frættu at vestmenningar høvdu umhugsað fútaforboð, sigur Heini Holm fráfarandi borgartjóri í Kvívík.

Hann heldur ikki, at tað er nøkur meining í hjá grannunum at fara at stríðast um hetta málið. Serliga lítið hugligt er tða hjá nýggjum bygdarráðum at byrja samstarv soeliðs, heldur hann.

Hann hevur tí heitt á tey nývaldu bygdarráðini í báðum kommununum um at tosa saman, soleiðis at tey, sum komandi skulu stýra kommununum, kunnu tosa seg til sættis.

Tað eydnaðist ikki at fá orð á fráfarandi borgarstjóran í Vestmanna, Gunn Joensen. Men formaðurin í havnarnevndini, Jóhan Hendrik Hansen, sigur, at hann veit ikki annað, enn at kvívíkingar hava steðgað arbeiðinum.

Hann váttar, at Vestmanna Kommuna hevur tosað um fútaforboð móti arbeiðinum, men kommunan hevur ikki biðið um nakað slíkt, sigur hann.

Komandi borgarstjórin í Vestmanna, Karl Olsen, sigur, at hann hevur frætt frá kvívíkingum um málið, og hann væntar, at tað fer at bera til at finna eina skilagóða loysn á málinum.

Heini Holm, fráfarandi borgarstjóri í Kvívík, greiðir frá, at talan er um eina ósemju um, hvar kommunumarkið gongur úr eftir Vestmanna. Kvívíkar Kommuna gongur at Heljareyga, sum er mark. Vestmenningar siga, at markið gongur haðani í eini linju yvir um vágna soleiðis, at hon verður so nær Válalandinum, at grótkastið, sum kvívíkingar ætla at gera, fer útum. Her eru kvívíkingar ósamdir.

Heini Holm sigur, at tað ber ikki til at fáa staðfest nágreiniliga, hvørki hjá Matrikulstovuni ella Landsverki, hvar hetta góða mark er.

– Á landi er eingin trupulleiki at staðfesta mark, sigur hann. Men tá komið verður á sjógv, er øðrvísi. Hetta er líkasum eitt grátt øki, sum ikki er roynt fyrr. So nú verður spennandi at síggja, hvussu hetta fer at enda, tí tað fer ivaleyst at verða nýtt sum dømi, um okkurt tilíkt seinni kemur fyri aftur, sigur Heini Holm.

# Fara varliga avstað

**Nýggi borgarstjórin í Vestmanna ætlar ikki at seta nakrar villar ætlanir í verk komandi árið. Fyrst skal ein langtíðarætlan leggjast, sigur Karl Olsen**

KOMMUNUVAL
*Edvard Joensen*



*Limirnir í nýggja bygdarráðnum í Vestmanna hittust hóskvøldið. Karl Olsen, sitandi í miðuni, verður nýggjur borgarstjóri í Vestmanna*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Vestmanna:**
Tað verða ongar villar ætlanir á skránni hjá nýggja bygdarráðnum í Vestmanna, sigur Karl Olsen, sum verður nýggjur borgastjóri í Vestmanna á nýggjárinum.

Nýggja bygdarráðið fer at halda fram við arbeiðum, sum eru í gongd, men hevur sjálvandi eisini sínar ætlanir, sigur Karl Olsen.

– Nú er barnansingin komin upp á pláss, so tað verður ikki tað, sum verður raðfest fremst, sigur hann. Vit fara heldur at raðfesta arbeiðspláss og vinnulív í fremstu røð, sigur hann.

Hann leggur tó dent á, at hetta er ikki nakað brot við tann politikk, sum rikin er í Vestmanna hesi árini, Kvinnulistin hevur sitið við stýrið. Tað eru arbeiði í gongd, sum hann heldur, at arbeiðast skal víðari við. Hann nevnir ikki nakað ítøkiligt uttan tað, at arbeitt helst fer at verða við onkrari ætlan um vetrarfriðing.

Ymisk mál eru, sum samstarvast má við grannakommunur um, sigur Karl Olsen. Eit nú barnavernd og eldraøkið, og tað fara tey so at taka upp sum eitt að fyrsta, heldur hann.

Tá Sosialurin tosaði við komandi borgarstjóran í Vestmanna, hevði eingin endalig skipan av nýggja bygdarráðnum verið. Hann var tá ikki greiður yvir, um arbeitt fer at verða við meiriluta og minniluta. Í øllum førum ynskti hann eitt gott samstarv millum allar bygdarráðslimirnar.

Hóast nýggja bygdarráðið ikki enn hevur tikið við, hevur tað kortini fingið sítt fyrsta mál, soleiðis meira ella minni. Tað er málið um bátahylin hjá kvívíkingum á Válinum.

Karl Olsen sigur, at hann væntar, at tað fer at bera til at loysa hatta málið í øllum góðum, og at samstarvið við Kvívíkar Kommunu um onnur mál eisini man fara at verða gott.

Nýggi borgarstjórin í Vestmanna sigur, at hann hevur kunnað seg um fíggjarsøðuna hjá kommununi, og har stendur ikki so illa til, sigur hann og fer í góðum treysti undir sítt fyrsta skeið sum kommunalpolitikari nakrantíð.

# Vágaligur dansur í Sørvági

**Leygarkvøldið verður dansur í Sørvági, har ágóðin fer til at stuðla Australiaferð hjá Ungdómsorkestrinum í Vágum**

STUÐULSTILTAK

Stuðulsdansur til frama fyrk Australiaferðina hjá Ungdómsorkestrinum í Vágum verður í Sørvági leygakvøldið.

Hetta verður Vágadansur burturav, siga fyrireikararnir. Orkestrið, sum er at spæla, er sett saman av tónleikarum úr Vágum, og nevnir seg Vága Jam. Og teir fara at spæla Vága Sound, siga teir. Teir spæla bara løg, sum orkestur úr Vágum hava givið út.

Ungdómsorkestrið í Vágum fyrireikar í løtuni eina ferð til Australia næsta summar. Tey hava ymisk tiltøk til tess at savna pening. Ætlandi fer Australiafeðin av vara tvær vikur.

**ej**

